

Nú er skjótt tíð at fara út við hvíslini og spakanum

MYND: ISTOCK

LAGT TIL RÆTTIS: Randi Jacobsen

# FAR **SPAKULIGA** TIL VERKA Í **HAVANUM**

SO LEINGI SUM **MOLDIN** ENN ER **VÁT**, EIGA VIT AT VERA **VARIN** VIÐ AT **GRAVA** OV NÓGV Í MOLDINI. TEY **RÁÐINI** GEVUR **HEINI JOENSEN** Í FYRITØKUNI VØXTUR. HANN KEMUR HER VIÐ NØKRUM **GÓÐUM** RÁÐUM

Várið er komið, og blómurnar spretta upp úr jørðini. Tey, sum hava hug til urtagarðsarbeiði, kunnu næstan ikki bíða við at fara út at arbeiða í moldini. Vit kunnu reinsa út eitt sindur av ilgrasi, men ikki gera ov nógv av enn.

So leingi, sum moldin er vát, er best at geva moldini frið. Fert tú at grava í moldini, kleimir tú hana ov nógv saman, og tú gerst meira skaða enn gagn, sigur Heini Joensen, gartnari í fyritøkuni Vøxtur.

Hann mælir til at geva moldini frið, tí eru maðkar í moldini, gera teir arbeiðið við at gera moldina léttari. Náttúran tekur sær sjálv av tí uppgávuni.

Ikki fyrr enn tað verður meira turt, kunnu vit fara út at lætta skorpuni á moldini eitt sindur á.

Rættast er at lata deyðar staudir liggja oman á moldini fyri veturin, tí tær halda upp á moldina, men nú kunnu vit fara út og taka alt tað deyða burtur.

Runnar kunnu vit eisini klippa nú, sigur Heini Joensen.



Hetta er ársíðin, tá ið vit skjótt kunnu byrja at grundaða við eitt nú nitrofoska, men einki við at brúka ov nógv tøð í senn. Best er at taða einar tríggjar ferðir um árið, nú, í juni og um ólavsøkutíð. Betur er at taða fleiri ferðir og lítið hvørja ferð enn at oysa tøð út yvir moldina.Verður taðað ov nógv í senn, er vandi fyri, at tøðini bara regna burtur.

Enn er ov tíðliga at gera nakað við grasvallir, tí tað er ov vátt. Tað eigur at hava verið turt í eina ella tvær vikur, áðrenn vit fara at gera nakað við grasvallirnar. Er nógvur mosi í vøllinum, kunnu vit fara við jarnrívuni og fáa mosan burtur. Har hol eru í, kunnu vit koyra grasfræ í, men enn er í so tíðliga at grastaða, sigur Heini Joensen.

Hann sigur, at tá ið ein vøllur verður yvirtikin av mosa, er tað ofta tí, at grasið er ov nógv klipt niður. Tað er gott bara at lata grasið vera har, tí um várið stríðast mosi og gras móti hvør øðrum, og tí skal grasið bara liggja, til gróðurin kemur. Mosin fæst ikki burtur bara við at kálka.

Harfyri ber til at fara út nú at sláa deyðagras.

Plantur mugu gjarna setast niður fram til hálvan mai, og eru tær í potti kunnu tær eisini plantast seinni.